VIÐMERKINGAR

# Fólkatingsvalið 2005



VAL05

**Niklái Petersen**
*tjóðveldisflokkurin*

Nú aka ABC - din flokkarnir stórslalom í valstríðnum, men tjóðveldisflokkin koma teir ongantíð uttanum, teir mugu altíð stýra um tjóðveldisflokkin.

Tað verður nógv høgt eftir tjóðveldisflokkinum í hesum døgum, bæði frá vinstru og høgru, hjá onkrum man tjóðveldisflokkurin vera grannvaksna líktornið, so ilt tað kennist.

Avstemmudankaði sjefidiologurin í fólkaflokkinum illneitast inn á tjóðveldisflokkin bæði tíðliga og seint, so tað fyri hann má kennast sum marran, tá hon er uppá tað ringasta, hesir stóru grannvaksnu tjóðveldismenninir, sum koma rópandi og brølandi oman um bøgarðarnar. Hann hevur annars brølað fyri seg gjøgnum tíðirnar.

Íhaldið ræðist mest sínar egnu, bara avgerðirnar verða tiknar so langt burturi sum gjørligt, ongantíð ov langt, so er tað í fínasta lagið.

Løgið at so skal vera, at man er nøgdur við molarnar, sum so hissini detta okkum í hendi.

Hvat er galið við at gera vart við og verja føroysk áhugamál á Fólkatingið, hví skal tað vera róp og skrál at verja sínn rætt!!!

Hví skal tað tutlast og mutlast um føroysk viðurskiftir í korridorunum á Kristiansborg???

Tjóðveldisflokkurin vil, at í Føroyum skulu føroyingar ráða og eingin annar.

Tjóðveldisflokkurin er og verður einasta hóttanin móti kolonipolitikkinum hjá danska statsapparatinum.

Vel so tað munar- vel góða røkt- vel tjóðveldisflokkin- vel lista E.

# Eitt vindeyga út í heim



VAL05

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*

Fólkatingssessurin er eitt vindeyga út í heim. Hiðani eigur ein óheft føroysk rødd at samstarva við politiskar flokkar í Danmark og í øðrum londum við. Hiðani eiga vit at menna møguleikar, ið kunnu gagna vinnulívi, mentan og gransking og sum geva Føroyum fleiri búskaparlig bein at standa á.

Hiðani eiga vit at tryggja tann føroyska sjálvsavgerðarrættin og at menna ta serstøðu, sum Føroyar hava og altíð hava haft mentunarliga og tjóðskaparliga, í ríkinum og í Evropa.

Hiðani skulu vit virka fyri sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum, og virka fyri, at tær avgerðir, ið Føroya Løgting tekur eisini verða framdar í Fólkatinginum.

Í sjálvstýrismálinum hevur fólkatingumboð Føroya eina stóra uppgávu at slóða fyri teimum semjum, sum eru í Føroyum.

Tað eru politiskir flokkar í Føroyum sum vilja alt ella einki. Teir fáa einki úrslit.

Tað politiskir flokkar í Føroyum, sum einki vilja, og sum tí heldur eingi úrslit fáa.

Triðji møguleikin er at berjast fyri tí framburði, sum ber til, og at fáa góð úrslit.

Javnaðarflokkurin er triði møguleikin.

# Vit fara upp úr skotgrøvini



VAL05

**Randi í Jógvanstovu**

Umboðan á fólkatingi er ein grundlógartryggjaður rættur, føroyingar hava, og skal hesin rættur verða brúktur á skilagóðan og virðiligan hátt, ikki sum tað hevur gingið fyri seg tey seinastu árini. Fjákalótir og rumbul til onga verðins nyttu.

Sokallað mál eru løgd fram ferð eftir ferð, einans við tí endamáli at halda gang um alt og einki.

Virðingin fyri fólkatingssessinum er farin "sín vej", og tað fer at taka langa tíð at byggja upp aftur álitiðið á føroysku fólkatingsumboðini.

Men Javnaðarflokkurin er til reiðar. Vit ætla at nýta hetta gylta høvið til frama fyri føroyingar. Vit ætla ikki at brúka tíðina upp á at grava gomul trøll fram, men fara at líta frameftir, tjóðini til frama.

Vilt tú verða virðiliga viðfarin, eigur tú at fara virðiliga fram. Fram kemur hann, ið hóvliga fer.

Á fólkatingi fer Javnaðarflokkurin at opna dyr, ikki at smekka tær í og soleiðis útiloka okkum sjálvi, sum tað hevur verið gjørt alt ov leingi.

Veljið eitt umboð fyri Javnaðarflokkin á fólkating.

Gott val.

# Grundlógin er grønlendsk



VAL05

**John Johannessen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Fólkatingið*

Eitt afturstig fyri Føroyar. Soleiðis hava serfrøðingar og andstøðupolitikarar skýrt eina avtalu um uttanríkispolitiskar heimildir, sum í drúgt tíðarskeið hevur verið til viðgerðar í fjølmiðlunum. Ein av trupulleikunum sýnist vera, at hon heftir seg nógv at einari uppfatan hjá donskum embætismonnum av donsku grundlógini.

Hendan avtalan er ein avtala ímillum Danmark og Grønland. Tískil hevur hon onki við Føroyar at gera.

Tað er rætt, at Løgmaður hevur samráðst við danir um eina yvirtøkulóg og um uttanríkispolitiskar heimildir. Men vit hava onga avtalu gjørt enn.

Grønlendingar hava samtykt avtaluna um uttanríkispolitiskar heimildir. Júst teirri, sum er viðgjørd í fjølmiðlunum her heima. Men vit í Føroyum eru ikki nøgd við grønlendsku loysnina, og tí samráðast vit víðari. Vit vilja hava eina betri avtalu.

Sostatt eru útsagnirnar í fjølmiðlunum gjørdar undir skeivum fortreytum.

Vit samráðast framvegis, og fara at brúka okkara fólkatingsumboðan til at fáa eitt gott samskifti í lag við danir um skilabetri loysnir.

# Føroya Mansstýri - ein saga blot



VAL05

**Rigmor Dam**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum*

Tíðin er búgvin til at broyta kyns- og aldursbýtið hjá teimum, sum í hesum landi ráða!

Tí fari eg við hesum vinaliga at biðja um tína atkvøðu á fólkatingsvalinum, so Føroyar kunnu fáa eina 33 ára gamla Javnaðarkvinnu á Fólkating, sum fyrst av øllum stríðist fyri rættvísi og vælferð fyri fólkið.

Eg bjóði meg fram at umboða teg á Fólkatingi næstu fýra árini. Míni hjartamál á Fólkatingi verða fyrst og fremst:

- at yvirtaka sjálvstýrismálið, so tað verður her heima, vit avgera tað, sum hevur við okkara land at gera
- at virka fyri, at Føroyar fáa fulla viðurkenning og fullan limaskap í Norðurlandaráðnum
- at ansa eftir, at føroyskt sjálvræði ikki verður avreitt til Bruxelles, tá Danmark letur frá sær vald til ES
- at fáa í lag gott og virðiligt samstarv við samstarvsfelagar á Fólkatingi - Føroyum og øllum føroyingum til frama
- at danir fáa eina rættvísa og virðiliga mynd av okkara kæra móðurlandi, og av okkum sum fólk og tjóð.

Blíðar heilsanir og gott val

# Skomm



VAL05

**Kjartin I Joensen,**
*Fólkaflokkurin*

Síðan 2001 hevur tann sakliga føroyska umboðanin verið avloyst av rumbulsmonnum. Nú má gongd koma á aftur eitt sakligt samskifti

# Av fólkatingi í Tinganes



VAL05

**Óli Nolsøe,**
*Fólkaflokkurin*

Vit vilja virka fyri, at avgerðir viðvíkjandi Føroyum verða tiknar í Tinganesi og ikki á fólkatingi.